# Børn við serligum tørvi slept upp á fjall

**Tilboðini til børn og familjur í Føroyum við serligum tørvi eru ikki nóg góð. Tað var staðfest á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum , har trivnaðar- og heilsustøðan verður sett undir sjóneyku. Ein spurnarkanning avdúkaði, at fakfólk rópa neyðarróp vegna børnini**



*Eyðun Christiansen, samfelagsfrøðingur, gav landsstýrismonnum Bill Justinussen og Páll á Reynatúgva nakað at hugsa um á ráðstevnuni um trivna og heilsu í Føroyum*

*Mynd: Jens K. Vang*

BØRN Í FØROYUM

*Ingi Rasmussen*

Børn við serligum tørvi eru dottin burturímillum í vælferðarsamfelagnum.

Tað var niðurstøðan hjá Eyðuni Christiansen, samfelagsfrøðingi, á ráðstevnuni »Føroysk trivnaðar- og heilsumál nú og í framtíðini«, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum í hesum døgum.

Tað er nýggja Trivnaðar- og heilsuráðið, sum skipar fyri ráðstevnuni. Ráðið hevur sett eina umfatandi kanning av føroyska almanna- og heilsuverkinum verk, og tað vóru fyribils úrslit frá hesi kanningini, sum Eyðun Christiansen legði fram.

Spurnarbløð eru send stovnum og skipanum, sum vara av føroysku børnunum. Og niðurlagið, sum gekk aftur hjá heilsusystrum, sjúkrasystrum, pedagogum og lærarum var, at neyðuga orkan ikki er at taka sær av børnum við serligum tørvi og teirra familjum.

### Ov stutt skipan

Tá ið foreldur at nýføðingum koma heim av føðideildini, fáa tey tilboð um heimavitjanir frá heilsusystraskipanini. Heilsusystirin kannar og eygleiðir barnið og ráðgevur foreldrum um menningina hjá barninum. Tá barnið er 18 mánaðir vitjar heilsusystirin ikki meira. Barnið kemur ikki aftur fyri teirra eygu, fyrr enn tað kemur í skúla og skúlaheilsusystraskipanina. Tað halda heilsusystrarnar vera stak óheppið, tí tær eru ofta tann sakkunnleikin, ið fyrst ber eyga við, at barnið ella familjan hevur ein serligan tørv.

Heilsusystrarnar møta við skúlabyrjan nógvum børnum við trupulleikum, ið kundu verið fyribyrgdir ella viðgjørdir fyrr, um til dømis heilsusystraskipanin hevði eitt skipað fyribyrgjandi tilboð til børn í aldrinum 2 til 6 ár, siga heilsusystrarnar í kanningini.

### Ongin psykiatari

Á landssjúkrahúsinum er B4 einasta barnadeildin í landinum. Í sínum svari sigur deildin, at hon í ávísan mun átekur sær uppgávur, ið áttu at verið loystar aðrastaðni. Hugsað verður fyrst og fremst um barnapsykiatri og fysiurgiska uppvenjing av brekaðum børnum. Brekaði børn við serligum tørvi eru ofta innløgd longri enn neyðugt, tí ongir umlættingarstovnar ella stovnar, ið taka sær av fysiurgiskari venjing, eru til hesi børnini.

Víst verður eisini á, at tørvurin á barna- og ungdómspsykiatriskari viðgerð ikki er nøktaður. Í álitinum »Psykiatriætlan fyri ár 2000« verður mett, at umleið 600 børn og ung hava tørv á psykiatriskari viðgerð. Tað er í løtuni ongin føroyingur útbúgvin í barna- og ungdómspsykiatri, men fólk vera send úr Danmark at viðgera børnini. Hetta nøktar sambært psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum langt frá tørvin á økinum, umframt at málsligi trupulleikin eisini ger vart við seg.

### Fá starvsfólk

Øllum kunnugt er ansingartrupulleikin av børnum stórur í Føroyum, men hann er batnaður nakað væl, síðan kommunurnar yvirtóku økið. Trupulleikin er bara, at talið av pedagogum ikki stendur mát við økta talið av stovnsplássum.

Í dagstovnalógini stendur, at minst tveir triðingar av starvsfólkunum á einum ansingarstovni skulu hava útbúgving, men mett verður, at bara helmingurin av pedagogstørvunum eru sett. Leiðarar fyri dagstovnar siga í hesum døgum í yvirlýsing, at tørvur er á umleið 130 pedagogum, men talið á pedagogum veksur bert við 24 um árið.

Tørvurin á námsfrøðingum minkar serliga um møguleikarnar hjá stovninum at hjálpa børnum og familjum við serligum tørvi. Og tað er serliga undir slíkum umstøðum, at tann fakliga vitanin er týdningarmikil, siga ansingarstovnarnir í kanningini.

### Skúlin svíkur

Í Fólkaskúlanum er sama skilið. Í álitinum »Lærari í Føroyum 2002«, verður víst á, at ein meiriluti av lærarunum ikki metir, at skúlaverkið megnar at taka sær av næmingum við serligum tørvi. Sostatt livir Fólkaskúlin ikki upp til at vera ein eindarskúli, har næmingarnir hava javnbjóðis møguleikar, og har undirvísingin er lagað til einstaka næmingin.

Á Sernámsdeplinum hava 45 børn við serligum tørvi sína dagligu skúlagongd. Talan er um deyv og menningartarnað, har fleiri eru fjølbrekað børn. Men heldur ikki her, er orkan, ið verður sett av til børnini við serligum tørvi, nøktandi. Stovnurin metir seg at fáa alt ov lítla játtan í mun til tað virksemið, ið stovnurin skal standa fyri.

Tá Eyðun Christiansen tók saman um kanningina var niðurstøðan sostatt einføld: Børnini við serligum tørvi detta burturímillum, og stórur tørvur er á arbeiðsmegi við fakligum kunnleika.

Endaliga frágreiðingin skal eftir ætlan vera liðug 31. desember, men hon er so umfatandi, at ivasamt er, um hon er liðug til ta tíð.

# MBF sóknast eftir uppskotum

**Meginfelag teirra brekaðu ætlar aftur í ár at lata eina viðurkenning til onkran, sum hevur gjørt tað høgligari fyri tey brekaðu at vera til. Nú sóknast felagið eftir uppskotum**

*Ingi Rasmussen*

Eitt av stríðsmálunum hjá MBF er, at øll kunnu vera saman uttan darvandi fysiskar forðingar. Felagið hevur tí valt at nýta høvið á altjóða degnum hjá teimum brekaðu, sum er 3. desember, til at lata eina viðurkenning til ein persón ella stovn, ið hevur gjørt eitthvørt munagott, sum sæst og merkist hjá teimum brekaðu.

Higartil hevur MBF latið viðurkenningina tríggjar ferðir, og aftur í ár ætlar felagið at heiðra onkran. Tí heitir felagið á fólk í Føroyum at vísa sær á persónar ella stovnar, sum tey meta hava uppiborið hesa viðurkenning.

Viðurkenningin var fyrstu ferð latin í 1995 til Margarinfabrikkina fyri í umbyggingini at hava gjørt tað møguligt hjá øllum at kunna luttaka í virkseminum í húsinum uttan mun til førleika.

Í 1999 fór viðurkenningin til Strandferðsluna fyri broytingar umborð á Smyrli, so tað gjørdist meira atkomiligt fyri øll, og fyri at Sandoyarferjan varð teknað soleiðis, at koyristólar uttan trupulleikar kundu koma umborð.

Í 2001 fingu eigararnir av Pállsstovu viðurkenning fyri av sínum eintingum og fyri egnan kostnað at hava framt eina umbygging, sum gjørdi tað møguligt hjá øllum at luttaka í virkseminum uttan mun til førleika.

Um fólk hava eitt uppskot um onkran, sum tey halda eigur at fáa hesa viðurkenning, kunnu tey seta seg í samband við MBF á telefon 317373 skjótast gjørligt og í seinasta lagi hósdagin 21. november.




*Bruce Willis spælir høvuðsleiklutin sum tann kendi yvirgangsmaðurin, sjakalurin. Hann fær eina uppgávu sum er at drepa ein persón, sum er millum hægstu embætismenn í USA. Samleikin hjá offrinum er loyniligur. Avtalan er, at sjakalurin fær 70 milliónir dollarar tá uppgávan er fullførd. Men Sjakalurin livur upp til navnið og nýtur jaktina minst líka so nógv sum tað at drepa. Eisini sjálvt um hann veit, at hann aftaná verður noyddur til at krógva seg fyri altíð. Sjakalurin er ein topp-professionellur leigudrápsmaður, sum hevur tað kyniska, sum skal til. Hann er nærum ómøguligur at fanga, tí hann megnar at skifta samleika og hvørva fullkomiliga. Av tí, at Sjakalurin er førur fyri at útynna tað so at siga ómøguliga, verður hann til ein gátuføran persón, sum FBI ivast í er til. FBI fer tí eftir tí fyrrverandi IRA-yvirgangsmanninum, Declan Mulqueen (Richard Gere),úr fongslinum, har hann situr ein dóm upp á lívlangt fongsul. Declan er tann einasti, sum kennir Sjakalin og kann steðga honum. Men tá Mulqueen saman við FBI og tí russisku eftirlitstænastuni koma ov nær Sjakalin, enda teir hinumegin byrsumúlan.*

*Leikandi: Bruce Willis, Richard Gere, Sidney Poitier*

*Leikstjóri: Michael Caton-Jones.*